# Fólk vilja fegin búgva í Skopun



*Hjúnini Katrina og Símun Martin Nicolajsen fluttu inn í nýggju húsini 5. juli í ár. Nøkur hús eru longu í økinum, og alt bendir á at tey gerast uppaftur fleiri í framtíðini*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

*- Her er eitt øgiligt bjartskygni í løtuni, sigur 44 ára gamli Símun Martin Nicolajsen*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**- Tað er ótrúliga stuttligt at síggja, at fleiri og fleiri búseta seg her í Skopun. Men kemur tunnilin ikki, fara tey heilt víst at flyta úr bygdini aftur, sigur Símun Martin Nicolajsen. Fyri trimum mánaðum síðani fluttu hann og konan inn í nýggj hús í Skopun.**

BYGDAMENNING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Skopun:** - Tað er sera hugaligt at síggja, at bæði føroyingar og útlendingar búseta seg her í Skopun. Slíkt gevur vón fyri framtíðina, sigur 44 ára gamli sjómaðurin úr Skopun.

Bæði Símun Martin og fólkið í bygdini hava staðfest at tey eru vorðin alt fleiri og fleiri hesi seinastu árini. Í dag búgva 503 fólk her, og vón teirra er, at talið fer at vaksa enn meiri.

Samstundis við hetta er hann sannførdur um, at treytin fyri framhaldandi vøkstri er ein tunnil inn á meginøkið. Hesin er at kalla bjargingin fyri oynna.

- Verður hann hinvegin útsettur í alt ov langa tíð - ella kanska slettis ikki kemur! - er stórur vandi fyri at fólkatalið fer ikki bara at minka, men minka sera nógv, staðfestir Símun Martin.

Tað positiva í gongdini beint nú er, at talan er bæði um føroyingar og útlendingar sum vilja búseta seg her. Hesi hava øll sæð at til ber at búgva í Skopun og arbeiða aðrastaðni.

Sjálvur veit Símun Martin alt um hetta, hesa tíðina hann hevur verið við fiskiskipi av Skálafjørðinum.

- Hesin møguleikin er til staðar í dag, men við einum tunli hevði tað verið nógvar ferðir lættari, sigur hann.

## Gott í Skopun

Fyrstu dagarnir í juli mánaði vóru sera hektiskir fyri hjúnini bæði. Umsíðir kundu tey síggja fram til løtuna, tá tey kundu flyta í egin hús í heimbygd hansara 5. juli í ár.

Tey høvdu frammanundan búð í øðrum húsum í bygdini, men ynsktu nú at byggja sær síni egnu hús í einum øki, har mong onnur ætlaðu tað sama.

- Hini húsini vóru gomul, og satt at siga, so skuldi rættiliga nógv gerast við tey.

- Vit vildu heldur byggja okkara egnu hús, tí vit mettu at tað fór neyvan at gerast tann stóri munurin í kostnaði, sigur Símun Martin og hyggur fegin yvir á konuna.

Hon nikkar játtandi og slær fast við einum stórum brosi:

- Ja, hóast eg eri úr Byrgi í Søldarfirði, so hevur mær altíð dámað sera væl her í Skopun!

> *Tað positiva í gongdini beint nú er, at talan er bæði um føroyingar og útlendingar sum vilja búseta seg her í Skopun*

## Skjót bygging

Tá tað gjørdist greitt, at Skopunar kommuna var í ferð við at stykkja út fyri fleiri grundøkjum norðarlaga í bygdini, vakti hetta eisini teirra áhuga.

Tey vendu sær til kommununa við fyrispurningi um byggiloyvi, og var svarið játtandi: “Treytin” var í stóran mun, at tey fóru í sving beinanvegin.

Sum sagt, so gjørt: Allir formalitetir vórðu fingnir til vega, og fyrr í ár var farið undir arbeiðið, og longu 24. apríl vórðu húsini reist.

Hetta gekk eisini við teirri rúkandi ferð hjá teimum átta kønu monnunum hjá Norðsetur í Hvalvík.

- Ja, hugsa tær til: Teir byrjaðu klokkan 8:10 og vilt tú trúgva mær: Longu klokkan tjúgu minuttir yvir eitt flaggaði!

- Tað er ótrúligt, so skjótt tað kann ganga, sigur Katrina.

## Bjartskygni

Nú eru bæði Katrina og Símun Martin í góðum árum. Líkt er til, at tey so líðandi verða umgird av øðrum yngri fólkum her norðarlaga í Skopun.

Tað unga fólkið í bygdini hevur bíðað spent eftir at tunnilin skuldi koma. Fyri mong er tað kanska ikki ein spurningur um tað verður um 2, 5 ella fleiri ár. Tað týdningarmesta er, at tey fáa vissu fyri at hann veruliga kemur!

Fyri ikki so langari tíð síðani stóðu eini 20 hús tóm í bygdini. Nú stendur vist bara tað eina tómt, tí fólk vilja búgva aftur her í bygdini.

- Eg haldi, at tað unga fólkið hevur fingið vón aftur fyri eini framtíð í bygdini. Tað er einki sum hindrar teimum at búgva her og at arbeiða í Havn.

- Jú, eg haldi, at fólkið er sera bjartskygd og trúgva veruliga, at ein tunnil kemur, og fer síðani at skapa lív aftur í bygdini, staðfestir Símun Martin.

## Tunnilin má koma

Hóast sandoyingar ynskja ein tunnil, so er tað ein veruleiki at tey hava rættiliga gott ferðasamband um Skopunarfjørð.

Teistin siglir fleiri ferðir um dagin millum Skopun og Gomlurætt, men tað kemur meiri enn so fyri at bilarnir eru fleiri enn pláss er fyri umborð.

Hetta ger seg serliga galdandi um vikuskiftini, men eisini aðrar dagar mitt í viku er hann ov lítil. Tí ynskja fólk at fáa eitt nøktandi samband alt samdøgrið.

Nýggja og stóra útstykkingin norðarlaga í Skopun er ein avleiðing av ætlanini at útvega sandoyingum fast samband til meginøkið. Nógv fólk úr oynni hava fingið grundøki í Skopun. Men eisini fólk heilt norðan úr Klaksvík ynskja at búseta seg her.

Fólk liva í vónini um tað fasta sambandið um Skopunarfjørðin, og hetta sæst eisini aftur í at handilsdepilin Lonin í Skopun ætlar at byggja út.

- Ja, tú skilir at her er eitt øgiligt bjartskygni í løtuni, slær Símun Martin fast.

## Teir ultimativu mótsetningarnir í Sandoynni

Henda greinin um hjúnini Katrina og Símun Martin Nicolajsen er byrjanin til eina greinarøð úr Sandoynni, har vit seta fokus á avleiðingarnar av Sandoyartunlinum, bæði so og so.

Í blaðnum mikudagin ber til at lesa eina samrøðu millum fíggjarmálaráðharran, Magna Laksáfoss og Eyðun Viderø av Sandi, har teir skifta orð um júst henda spurningin.